Vikuskiftis Sosialurin



# Føðingar



*8. nov. 2006 fingu Jens Pauli & Ronja ein lítlan beiggja. Hann viga›i 2625 gr og var 51 cm langur. Foreldrini eita Marianna og Súni, og tey búgva úti á Hamarinum á Argjum*

5. november fingu Annbritt og Kim Klausen eina dóttur. Hon var 39 cm. long og vigaði 1300 gr. Hon eitur Silja Victoria Klausen.

17. november fingu Signe og Janus H. Jacobsen í Svendborg eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4000 gr.

21. november fingu Anni M. Jensen og Jacob Tihekari Willumsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3380 gr.

24. november fingu Anita og Jørleif Joensen, Strendur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3650 gr.

25. november fingu Henning og Marjun Hansen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2750 gr.

25. november fingu Hertha Jónsdóttur Simonsen og Rúni Olsen Ellefsen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3550 gr.

26. november fingu Conny Simonsen og Eisenberg Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3350 gr.

27. november fingu Annika W. Joensen og Hørður Wardum, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3900 gr.

27. november fingu Heidi og Páll Jacobsen, Runavík, eina dóttur, ið eitur Sesilia Pállsdóttur Jacobsen. Hon var 55 cm. long og vigaði 4100 gr.

28. november fingu Hildur og Eyðun Samuelsen, Hoyvík, tvíburar - dreingir. Tann eini var 49 cm langur og vigaði 2500 gr. og hin var 49 cm langur og vigaði 2440 gr.

28. november fingu Joan Joensen og Leif Hovgaard, Tórshavn, eina dóttur og stóribeiggi Brandur eina lítlasystur, sum var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

29. november fingu Ásbjørg Emilsdóttir Thomsen og Palle Dam Nielsen, Skopun, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2500 gr.

29. november fingu Jórun og Høgni av Skarði, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

29. november fingu Elisabeth og Petur Juul Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3850 gr.

30. november fingu Gunnvaldur Lützen og Tina Ragnudóttir á Velbastað, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4100 gr.

## Minningarorð um høgt elskaðu mammu mína

# Hannelinu Joensen, Gjógv

**f. 5. desember 1937 - d. 24. mars 2006**

Góða mamma, tað kennist mær ómetaliga tungt at sita her og skriva nøkur minningarorð um teg, ið brádliga og óvæntað - uttan langa sjúkralegu - legði árarnar inn. Tað er óskiljandi.

Saknurin er bara so stórur, og tú hevur latið eitt stórt tómrúm eftir teg. Tú fylti so nógv í lívi okkara, tí tú vart altíð har fyri okkum. Tú vart eitt so hjartagott menniskja, og tú vísti kærleika til øll, sum tú umgekst, soleiðis sum Guds børn eiga at gera.

Mamma var dóttir Jóhonnu og Sofus Debes og var elst av trimum systkjum. Hini bæði eru Oddvør og Óli.

Líka frá barnsbeini tók hon lut í tí dagliga arbeiðinum. Og mangt var at tríva í, tí nógv var jørðin í húsunum, umframt handil og telefonstøð, so har kom dagliga nógv fólk inn á gólvið.

Mamma vaks upp í einum trúgvandi heimi, har kristindómurin var ein natúrligur partur av gerandisdegnum. Hesa trúgv, sum hon sjálv átti, bar hon víðari til mín og ommubørnini.

Mamma lærdi okkum eisini at leggja alt í Harrans hond, og tað er ein tryggur grundvøllur at byggja lívið á.

Mammusa lutur lá ongantíð eftir. Hon var sera arbeiðssom, ágrýtin og røsk. Í skúlanum var hon sera nærløgd og nom, og serliga væl dugdi hon at rokna. Tað kom henni rættuliga til góða í handlinum, tí hon var sjáldsama kvik at rokna í høvdinum.

Mamma hevði haraftrat so gott minni sum fáur. Tað var neyvan føðingardagur ella merkisdagur, hon ikki mintist.

Lívstarvið hjá mammu gjørdist at taka sær av øðrum. Fyrst hjálpti hon foreldrunum, var síðani á Eiði, til hon seinast í fimtiárunum fór til Gøtu at tæna. Har birtist stórur trúskapur húsanna millum, ið hevur hildið sær til henda dag. Mamma kom aftur til Gjáar í 1960 at passa handilin og hevði nógv við hann at gera, til handilin læt aftur nýggjársaftan 1992.

Mamma hevur sitið í kirkjuráðnum í 40 ár - hon tók við eftir abba. Meginpartin av hesum árunum vaskaði hon eisini kirkjuna og skúlan, til lívstráðurin brádliga varð slitin. Stillisliga útinti hon verk sítt – uttan nakað hóvasták. Hon var trúføst og hjálpsom – altíð klár við eini hjálpandi hond.

Mamma og pápi giftust 15. desember 1963, og fingu tey meg. Tað mundi komast av tí, at eg eri einkardóttir, at mamma og eg fingu eitt so serligt inniligt samband - hon var ikki bara mamma, men systir og vinkona samstundis. Hetta ger sorgina upp aftur tyngri at bera. Tað er kanska ringt hjá øðrum at skilja, men eg sakni hana bara so nógv, tí vit høvdu so nógv saman. Tað fór ikki dagur, uttan at vit tosaðu saman fleiri ferðir – men nú er rødd hennara tagnað.

Eitt tað fyrsta, ið rennur mær til hugs í sambandi við mammu,



var hennara góða hjartalag og stóra umsorgan fyri øllum sínum. Soleiðis tók hon við opnum ørmum ímóti manni mínum, Jørgini. Tey bæði høvdu eisini almikið til felags av øllum bygdarlívinum og tí, sum fyrifórst í bø og haga.

Henni untist ta gleði at fáa trý ommubørn, og vóru tey hennara eitt og alt - síggja tey trívast og mennast og sleppa at gleða tey. Altíð var hon tøk, tá ið brúk var fyri eini hjálpandi hond.

Mamma var altíð klár at koma suður at hjálpa, tá ið børnini vóru sjúk - um tað so var tíðliga ella seint. Visti hon t.d. um kvøldið, at børnini vóru sjúk, ja, so kom hon suður í fyrstu rutu morgunin eftir. Soleiðis var mamma bara, altíð klár at hjálpa og hugna – vaska og baka, og hvør minnist ikki pannukakurnar.

Góða mamma, vit hava so nógv góð minnir eftir teg, og tey fara vit altíð at goyma í hjarta okkara. Tú vildi okkum alt tað besta, og áhugin fyri okkum øllum var ovurstórur, og alt tað, tú gjørdi fyri okkum, er nakað, sum ikki kann sigast við orðum.

Børnini elskaðu, tá tú komst suður til okkara, tey plagdu at spyrja, nær omma kom suður aftur. Tey elskaðu teg - og tú tey. Bara við at vera tann tú vart, skapti tú henda serliga hugnan rundan um teg – altíð í tí stilla. Tú hoyrdi til, um tað so var føðingardagur, ella hvat tað so var.

Umsorgan tín fevndi tó nógv longri enn til tínar næstringar, og mong eru tey, sum hava notið gott av tínum gestablídni og sitið væl inni hjá tær.

Tú vart góð við Gjáar bygd, og við tær er aftur ein bygdarmynd farin. Vit sanna orðini hjá skaldinum: “Har ljós brenna fá undir lágari lon, sæst gjølla, tá eitt teirra sløknar”.

Tú livdi við og vart við í bygdarlívinum. Tú spardi teg ikki – hvørki inni ella úti. Tú átti tín sjálvsagda lut í hoyggingini, í eplunum, hjá seyðinum – ja, øllum.

Góði pápi, tú hevur siglt sum sjómaður og kokkur alt títt lív, og nú tú legðist uppi, gleddust vit um, at tit bæði framhaldandi áttu nøkur góð ár saman, men Harrans vegir eru ikki okkara.

Mamma og pápi, tit vóru eini fyrimyndarlig hjún – og eini fyrimyndarlig foreldur. Alt tað góða, ið tit hava lagt niður í meg og míni, er dýrabærur føRningur á lívsleiðini frameftir.

Tað er so nógv, ið bara er farið, nú vit hava mist mammu. Tað er so tómligt at koma norður, nú eingin mamma er. Altíð komu mamma og pápi út á trappuna at taka ímóti okkum.

Mamma, mær leingist so illa eftir tær – og serliga nú føðingardagur tín 5. desember er beint fyri framman – jólini nærkast – familjan samlast – og tín sessur er tómur.

Fyri júst einum ári síðan gjørdist tú sjúk, men tað vardi okkum ikki, at tað skuldi ganga so skjótt. Ikki gramdi tú teg - men gleddi teg bara at sleppa at arbeiða aftur og sleppa út millum fólk.

Ikki dámdi tær at planleggja ov nógv. Bara heilsan er, so gongur alt, og mann skal vera glaður at kunna arbeiða, plagdi tú at taka til.

Tað allar síðsta, tú gjørdi, var at leggja teg í Harrans hendur. Tað er gott at minnast - góð minnir at byggja á, men saknurin er so ómetaliga stórur bæði hjá pápa, okkum og eisini hjá mostur og mammubeiggja, ið nú hava mist systur sína.

Góði pápi! Vit hugsa nógv um teg, men vit gera sum mamma gjørdi – leggja okkum í Harrans hendur, so vinnur ljósið á myrkrinum umsíðir.

Hvíl í friði góða mamma og takk fyri alt.

Við hesum orðum lýsa vit frið yvir minnið um mína elskaðu mammu.

*Góða mamma, tú ið lívið gav mær,*
*aftur koma barndómsdagar ei,*
*men tey ljósu minni, eg fekk*
*frá tær,*
*vilja lýsa mær á lívsins leið.*

*Meðan tú enn livir vil eg veita*
*hesa hjartans heitu tøkk til tín,*
*og av sonnum skalt tú altíð eita*
*heimsins besta mamma,*
*mamma mín.*

**dóttir tín Oda**